# Gingu næstan níggju tímar

**Stutt fyri klokkan tvey seinnapartin nýggjársdag, funnu froskmenn frá sløkkiliðinum líki av einum manni við Eystaru bryggju í Havn. Løgreglan fekk boðini kl. 00.40, men ikki fyrr enn kl. 9.35 byrjaði leitiarbeiðið**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Síðani líkið eftir 35 ára gamla Magna Hentze í gjár varð tikið upp við Eystaru bryggju í Havn í gjár, hava mong spurt seg sjálvan, hví tað gekk so long tíð, frá tí løgreglan fekk boðini til leitiarbeiðið byrjaði.

Árið 2007 var ikki meiri enn 40 minuttir gamalt, tá løgreglan fekk eina fráboðan frá Havnaskrivstovuni um, at tey umborð á Lómi mettu, at tey møguliga høvdu sæð okkurt sum líktist einum menniskjakroppi, tá tey løgdu við kei.

– Men boðini, vakthavandi fekk vóru so mikið ógreið og ósikkur, og avtalað varð, at Havnaskrivstovan skuldi kanna hetta nærri, sigur Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur.

Klokkan 06.45 tosað Havnaskrivstovan og Løgreglan saman aftur, og tá vóru boðini greiðari. Nú mettu tey seg við vissu kunna siga, at her var talan um ein menniskjakropp í sjónum, og klokkan trý korter til tíggju fór leitiarbeiði í gongd.

Hetta merkir, at tað ganga út við níggju tímar frá tí at løgreglan fær boðini, til at leitiarbeiði byrjar.

– Tað er ein avgerð vakthavandi hevur tikið, eftir at hann hevur tosað við fráboðaran. Metingin, vakthavandi gjørdi var, at boðini vóru so mikið ógreið og tí lat man tað liggja fyribils.

– Men man vildi ikki hava boðini liggjandi á sær. Tí verður tosað aftur við Havnaskrivstovuna seinni, og klokkan 9.45 byrjar leitiarbeiði, sigur Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur.

Jón Klein Olsen sigur, at tað sum hann kann fyrihalda seg til er fakta. Hann sigur, at sæð í bakspeglinum, so fær hann ikki afturvíst, at ein stór leiting átti at verið setti í gongd beinanvegin, sum teir fingu fráboðanina. Tó er varapolitiinspektørurin ikki av teirri fatan, at vakthavandi hevur gjørt nakað skeivt.




*Froskmenn hjá Sløkkiliðnum funnu druknaða mannin stutt fyri klokkan tvey nýggjársdag*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*




*Tað var farmaskipið Lómur, sum boðaði frá, at tey høvdu sæð ein mann undir skipinum, og maðurin varð seinni funnin undir skipinum*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Maður druknaður á Havnarvág

Nýggjársdag var maður funnin druknaður á Havnarvág.

Tað var tá farmaskipið Lómur kom á Havnina í nátt, at teir hildu seg síggja okkurt, ið líktist einum fólki á sjónum.

Froskmenn fóru niður um hálvgum tveytíðina nýggjársdag, og funnu teir stutt eftir líkið undir farmaskipinum Lómi. Talan er um 35 ára gamla Magna Hentze úr Suðuroy.

**-rwd**

# Sløkkiliðið undrast

**Sløkkiliðið í Havn undrast á, at tað gekk so long tíð, áðrenn teir fingu fráboðanina um druknaða mannin.**

**– Vit høvdu fyritrekt at fingið boðini beinanvegin, sigur Kartni Jacobsen, sløkkiliðsstjóri**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Millum teirra, ið hava undrast á, at tað tók so langa tíð, frá tí at løgreglan fekk fráboðanina, til at leitiarbeiði byrjaði, er sløkkiliðið í Tórshavnar Kommunu.

– Vit vita onki fyrr enn fráboðanin kemur til okkara um morgunin, sigur Kartni Jacobsen, sløkkiliðsstjóri í Tórshavnar Kommunu, og vísir harvið á, at teir ikki fáa gjørt nakað fyrr enn ein fráboðan kemur til teirra.

Kartni Jacobsen sigur, at teir sjálvandi ikki kunnu vita hvør og hvussu fráboðanin hevur verið.

– Men vit kunnu undrast yvir, at fráboðanin kemur so seint til okkara, sigur hann.

Vit spyrja sløkkiliðsstjóran, um tað ikki átti at verið so, at um onkur hevði hildið seg sæð eitt lík á sjónum, so skuldi teir fingið boðini um hetta beinanvegin?

– Tað vildi eg hildið, at tað átti at verið so, sigur Kartni Jacobsen og leggur so aftrat, at teir hava alla útgerð til hetta slagi av arbeiði.

– Vit høvdu fyritrekt, at boðini komu víðari til okkum beinanvegin. So høvdu vit fara út beinanvegin, og eisini sloppið undan aðrir bátar og skip komu inn, sigur hann.

Sløkkiliðið hevur tilkallingsvakt. Har er altíð fólk til arbeiðis, og tí er tað teimum líkamikið um tað er nýggjársaftan, týsdagur, dagur ella nátt. Teir kunnu fara úr húsinum upp á nakrar heilt fáa minuttir, men nýggjársdag skuldi tað altso ganga knappliga níggju tímar, frá tí at løgreglan fekk fráboðanina til at leitiarbeiðið byrjaði.




# Løgreglan nógv ymiskt at takast til

Hjá løgregluni hevur vikuskiftið hevur verið drúgvari enn vanligt, tí bæði frígggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnukvøldið vóru fólk í býnum. Av løgreglustøðini í morgun varð sagt, at hóast nógv smáting høvdu verið at tykist við, so var hetta vikuskiftið tó ikki verri enn vanligt.

Ymiskar vóru tó uppgávurnar. Alt frá harðskapi í býnum, til herverk, til eina spreinging í einum nýggjársbáli í Miðvági og til at taka ein druknaðan mann upp úr Havnarvág.

Av ítøkiligum málum kunnu vit nevna, at til nýggjársbálið í Miðvági var ein brádliga ein spreinging úr bálinum. Sløkkiliðið avbyrgdi bálið, tí man óttaðist møguliga fleiri spreingingar fóru at koma, men meiri enn tað sama hendi tó ikki.

Ógvusligastu harðskapsmálini vóru, tá ein maður varð skallaður niður í býnum, og tá ein annars fekk ein fløsku knústa í høvdið. Og eitt av teimum mest keðiligu herverksmálunum var, tá ein fløska varð tveitt inn í gjøgnum rútin á einum privathúsum við Landavegin í Havn.

Nýttársaftan gjørdist brádliga hált um stóran partar av landinum, og hetta sást eisini aftur við síðurnar landsvegunum kring landið, har nakrir bilar endaðu. Ongin størvegis fólkaskaði stóðst tó av hesum, hóast nakrir bilar fóru illa.

**-rwd**



*Hesin bilurin fór út av vegnum sunnan fyri Hósvík nýttársaftan, men ongin fólkaskaði stóðst av óhappinum*
*Mynd: Rólant Waag Dam*